**FÓLKATINGVALIÐ 2001**

# Fullveldi her og nú – ella vælferð fyri fólkið!

**Birgir Mohr**
*Valevni Javnaðarfloksins*



Okur føroyingar noyðast nú at velja ímillum: »fullveldi her og nú« – ella »eitt føroyskt vælferðarsamfelag fyri fólki«. Peningur er ikki til bæði.

Prísurin fyri fullveldi er, at vælferðin sindrast og ótryggleikin veksur. Tað síggja vit í dag. Meðan fullveldissamgongan rósar sær av stórum yvirskoti á fíggjarlógini og fullum landskassa, so versna vælferðarviðurskiftini alsamt á flestu økjum í føroyska samfelagnum: bæði á heilsuøkinum, skúlaøkinum, umsorgarøkinum og pensiónsøkinum, og nógvar familjur fáa ikki endarnar at røkka saman fíggjarliga. Fólkapensiónin røkkur ikki til at halda hús fyri. Alt meðan vit hava hákonjuktur.

Hetta er prísurin fyri fullveldispolitikkin og bert byrjanin, tí tað kann gerast nógv verri, verður hesin politikkur ikki steðgaður. Loysing her og nú er óneyðug, tí eingin í Danmark hóttir okkum føroyingar.

Fólkaatkvøðu tordi landsstýrið ikki at halda – latum okkum nú greitt vísa frá okkum loysingarpolitikkin, men siga ja til vælferð Føroya fólks.

Hetta gera vit best við at velja Javnaðarflokkin, sum vil savna føroyingar um eina nýggja rúmliga skipan í ríkisfelagsskapinum, sum gevur okkum føroyingum meiri sjálvstýri, uttan at vit missa fyrimunirnar við ríkisfelagsskapinum. Uppskotið um sjálvstýrislóg er tilboð til allar flokkar at samstarva um.

Javnaðarflokkurin fer ikki at senda hundraðtals milliónir aftur til Danmarkar, men ístaðin at leggja okur í at fremja tiltøk fyri fólkið:

1. økja samhaldsføstu pensiónina til kr. 10.000 fyri støk og kr. 16.000 fyri hjún.
2. byggja heim til eldri við 160 røktarheimsplássum yvir 4 ár.
3. betra bústaðarviðurskiftini hjá teim førleikaskerdu føroyingunum beinanvegin.
4. uppprioritera skúlaøkið, tí børnini og tey ungu eru framtíð Føroya.
5. syrgja fyri neyðugum játtanum til heilsuverkið, so vit øll kunnu kenna okkum trygg, tá sjúka rakar.
6. Og Javnaðarflokkurin veit, at einskiljing – privatisering – er ikki einasta loysnin á trupulleikunum – tvørturímóti. Privata vinnulívið skal hava rímuligar treytir at virka eftir, sjálvandi, men tað eigur ikki at loysa almennar uppgávur.

Flest okkara, sum nú liva, minnast aftur til 6. okt. 1992. Tá var tað eingin, sum tosaði um privatiseringar sum einasta loysnin av samfelagstrupulleikum. Nei, nú máttu Palleba og Marsanna taka um endan.

Tí eru fleiri fyritøkur almennar í dag. Nú er stundin komin til at geva Palleba og Marsannu lønina aftur fyri at bjarga samfelagnum í 1992.

Tí sigur Javnaðarflokkurin: fólkið fyrst!

Veljarar í Sandoyar valdømi og annars um alt Føroya land: Farið á val og veljið ein sterkan Javnaðarflokk. Javnaðarflokkurin setur ikki vælferð Føroya fólks upp á spæl í ríkisrættarmálinum við Danmark.

Gott val!

# Vit vassa ikki longri út enn vit grynna

**Leila á Lofti**
*Valevni Fólkafloksins*



Nú tað stundar til fólkatingsvalið, eru tit óivað fleiri, ið ikki hava avgjørt, hvar tykkara atkvøða skal fara.

Gevið Fólkaflokkinum hana. Tá hava tit so ongan skaða gjørt, tí Fólkaflokkurin dugir ikki at leypa framav.

Vit hava sum endamál sjálvstýri fyri Føroya fólk – uttan fyri ríkisfelagsskapin, ongin ivi um tað. Men hátturin, metodan, at náa hesum endamáli er frá Fólkafloksins síðu lagaligur.

Startskotið, í nýggjari tíð, fyri sjálvstýristilgongdini ljóðaði, tá seinasta samgonguskjal var undirskrivað, og enn eru ikki 4 ár liðin.

Fyri tey, sum hava fingið sjálvstýrishugsjónina í seg við móðurmjólkini og borðreidda aftur við náttúrðanum upp gjøgnum øll barna- og ungdómsárini, fyri tey eru 4 ár ivaleyst long tíð, men fyri restina av okkum eru 4 ár ikki ov nógv. Hóast fullveldið ikki er rokkið, so nýtist okkum ikki at fella í fátt hvat tí viðvíkur.

Tá ið fólkið kennir seg trygt, ber til at gera broytingar í tí ríkisrættarligu støðuni, men eru vit ótrygg við tí aktuellu støðuni, lata vit heldur standa til, ella í versta føri fara aftur til tað gamla, og tað haldi eg vera syrgiligt, tí soleiðis nýtist ikki at vera, tað eiga politikarar við rættari áskoðan lættliga at kunna byrgja upp fyri.

Júst her hevur tú Fólkaflokkin sum tann flokk, ið ikki vassar longur út enn vit grynna, men sum við eini yvirtøku fyri og aðrari eftir spakuliga vil førka okkum nærri og nærri ímóti endamálinum, fulla ábyrgd av egnum landi. Ímeðan nær sjálvstýrishugsjónin at búnast so mikið í hvørjum einstøkum av okkum, at einki alternativ er betri enn full og heil ábyrgd av okkum sjálvum.

Tit kunnu lesa hetta, eg skrivi, men fullveldi er ikki nakað, vit kunnu lesa okkum til, tað mugu vit arbeiða okkum fram til, tað vita flest allir føroyingar, tí skilji eg tykkum øll væl, ið eru bangin fyri aftur at noyðast at arbeiða 60 tímar viku og sum eru bangin fyri, at skatturin fer hægri upp í staðin fyri niður, sum Fólkaflokkurin ynskir. Ella sagt á annan hátt, at tað sindrið av vælferð, vit eru komin til, vilja vit ikki av við.

Akademikarar og onnur væl lærd kunnu lættliga sleppa sær av landinum og fáa annað arbeiði, men hvar skal restin fara, serliga tann restin, sum heldur landinum uppi, hvar skulu tey fara, skuldi tað endað galið enn einaferð?

Tí er tað so avgerandi, at tú setir krossin á rætta stað.

Fólkafloksumboðið á Fólkatingi setur tryggleikan hjá tær í hásæti, onki nýtt er í tí, tað vita vit øll av royndum.

Vit standa ikki í stað, ei heldur vit fara aftur til tað gamla, men førka okkum spakuliga og trygt í samráð við restina av ríkinum fram móti fullveldinum Føroyar.

Góðu tit, stuðlið okkum, eisini til hetta valið.

# Ein og hvør kann skapa ósemjur - ein semja krevur sín mann!

**Thomas Arabo**
*Fólkatingsvalevni*
*Javnaðarflokksins*



Politiska leiðin í løtuni hevur fokuserað so nógv uppá fullveldi, at vinstra høgra er vorðið burtur.

Verandi støða merkir, at ein atkvøða fyri Tjóðveldisflokkinum er ein atkvøða fyri Fólkaflokspolitikki tá tað kemur til arbeiðsmarknaðin í Føroyum.

Vit kunnu bara hyggja at pensiónsmálinum. Hetta er stak harmiligt, tá hugsað verður um, at Tjóðveldisflokkurin og Javnaðarflokkurin hava søguligani sæð verið teir føroysku flokkarnir við tættast tilknýti til fakfeløgini.

Eg vil staðiligani heita á fakfeløg og vinnulív um at umhugsa sína støðu sera gjølla uppundir hettar fólkatingsvalið. Fakfeløg, vinnulív og ikki minst handilslív hava felags áhugamál í hesum málinum. Tað er naivt at halda, at ein búskaparligur niðurskurður á fíggjarlógini ikki fer at ávirka forbrúkið í samfelagnum. Verðin er í einum búskaparligum aldudali, og løgið skuldi verið, um hetta ikki eisini rakti Føroyar.

Alivinnan er í trupulleikum, rækjuflotin koyrir tungt og kostnaðurin av at umsita hettar landið er ov høgur. Óansæð hvussu leikur fer, so eru nýggjar vinnur, sosum oljuvinna, í besta føri framtíðarmusikkur. Hetta er ikki nøkur dómadagsprædika, men bert ein áminning um at skalka lúkurnar í føroyska búskapinum og ikki trúgva uppá, at trøini veksa inn í himmalin.

Menn vóru eftir mínum tykki í so grammir at skerja blokkin herfyri, tí hendan skerjing kann lætliga føra skattahækking og harvið minni peningaumfar í samfelagnum við teimum avleiðingum tað hevur.

Vit mugu ikki enda í einari støðu, har vit ikki hava ráð til vælferðarsamfelagið, tí menn lupu í óðum verki, uttan at hyggja at búskaparliga barometrinum og ikki minst uttan at lurta eftir fakfeløgunum. Javnaðarflokkurin vil virka fyri at lurta og gera semjur. Ein og hvør kann skapa ósemjur - ein semja krevur sín mann!

# Ein fræls føroysk rødd á fólkating

**Atli Hansen**
*Valevni fyri*
*Sambandsflokkin*



Valdagurin er komin og vit, sum hava luttikið í fundum og orðaskiftum fara at leggja inn.

Persónliga fari eg at takka teimum, sum hava lagt oyra og eyga til tað, sum eg havi borið fram. Fyri ein bekennandi sambandsmann er tað ikki torført við lív og sál at kasta seg inn í dystin fyri at verja ríkisfelagsskapin. Fyri okkum sambandsfólk er hann líka so natúrligur sum tað at vakna hvønn morgun og líka so týdningarmikil sum okkara andadráttur.

Tí hava vit hesa seinastu tíðina sæð eldhugaði sambandsfólk á øllum geilarhornum við einum greiðum boðskapi um, hví tað er so umráðandi at fara á val og velja Sambandsflokkin.

Eg takki sum sagt fyri meg og fari vegna Sambandsflokkin at biðja um tygara atkvøðu til at fáa ein sambandsmann á fólkating at svara fyri okkara tjóð.

Takk fyri hesaferð. Vit hittast aftur til løgtingsvali. Tá fari eg at biðja um tað sama.

Veljið Sambandsflokkin - setti krossin við lista B - ein fræls føroysk rødd.

Gott val.



**FÓLKATINGVALIÐ 2001**

# Kvinnur til pynt í Norðurlandahúsinum

**Elin Lindenskov**
*Fólkatingsvalevni*
*Javnaðarfloksins*



Í Norðurlandahúsinum sunnukvøldið sást, hvussu nógv føroysku flokkarnir virða kvinnuna.

Fólkaflokkurin hevði tríggjar kvinnur við á fundin. Eg sat leingi og bíðaði eftir at hesar "damurnar" fóru upp á røðarapallin. Eg skuldi bíða leingi. Tí tær sluppu ikki framat røðarapallinum, men sótu ístaðin bara "til pynt" millum menninar, sum skulu veljast, um ikki hesaferð, so til løgtingsvalið.

Tjóveldisflokkurin hevði heldur ikki pláss fyri kvinnunum. Har sat ikki ein einasta við teirra borð. So har komu eingi mergað tjóðveldisorð frá nakrari kvinnu.

Miðflokkurin beinleiðis reypaði á røðarapallinum av at hava flestar kvinnur á listanum. Men ikki ein einasta var við í Norðurlandahúsinum. Ikki ein einasta slapp at siga sín hugsan.

Í Sjálvstýrisflokkinum sær tað út til, at ongar kvinnur eru eftir. Har sótu teir tríggir menninir, sum teir hava at bjóða fram.

Í Javnaðarflokkinum eru vit sannførd um, at tað er best, tá ið bæði kynini eru umboðað eins væl. Tí var Javnaðarflokkurin umboðaður av tveimum kvinnum og tveimum monnum.

Sum ein av teimum fáu kvinnunum, bjóði eg meg fram sum kvinnuligt valevni til fólkatingssessin. Eg fari á fólkatingi at nýta stóra orku upp á at greiða dønum frá føroyska fólkaynskinum um broytingar í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark innan fyri ríkisfelagsskapin.

Far á val og vel samstarv og loysnir. Vel eina javnaðarkvinnu. Gott val.

# Javnaðarpanikkur

**Lisbeth L. Petersen**
*Sambandsflokkurin*



Meðan tíðin styttist til avgerðin verður tikin um umboðan okkara á Fólkatingi, tykist rættiligur panikkur at vera komin í Javnaðarflokkin og serliga floksformannin.

Nú skal Sambandsflokkurin vera evnið hann brúkar og fer illa við, fyri at bjarga sær sjálvum.

Sjálvandi fer tað ikki at halda Sambandsflokkinum aftur at stríðast víðari, tvørturímóti, men pástandir úr leysari luft, sum javnaðarformaðurin vartar upp við, krevja viðmerkingar.

Jú víst loysir tað seg at velja Sambandsflokkin. Fyri tað fyrsta vilja vit varðveita fólkatingsumboðanina, tí hon er týðandi táttur í tí samstarvi, sum vit hava í ríkisfelagsskapinum.

Tað vil Javnaðarflokkurin ikki. Hann vil bara hava sessin.

Sambandsflokkurin ætlar sær framhaldandi at samstarva við flokkin Venstre, har vit kunnu fáa umboð í nevndir og innlit í mál, sum Jóannes ikki fær sum leysgangari. Og samskiftið við donsku politikararnar og kunnleiki teirra um føroysk viðurskifti kann bert gerast betri.

Jú víst vil Sambandsflokkurin hava broytingar, og samráðingaruppleggið liggur klárt at brúka.

Vónandi fáa vit samstarv við Javnaðarflokkin í framtíðini, tí hann, eins og vit, vil vera verandi í ríkisfelagsskapinum.

Vit gleðast um, at Javnaðarflokkurin kom uppá betri tankar, tá hann slepti fullveldisætlanunum og vendi aftur til ríkisfelagsskapin, sum Javnaðar- og Sambandsflokkurin høvdu sum felagsmál saman við Sjálvsstýrisflokkinum, tá vit fingu heimastýrislógina.

Jóannes átti heldur at brúkt krútið uppá fullveldisflokkarnar enn at leggja sjógv millum sín og okkara flokk, um tað veruliga er ætlan hansara at bjarga ríkisfelagsskapinum, sum nú er í vanda, og við tí felagsskapinum eisini bjarga persónliga frælsið hjá tí einstaka og vælferðarsamfelagið Føroyar.

# Sambandsflokkurin er alternativið – Heimsrákið er samband

**Edmund Joensen**



Veljarin hevur 6 flokkar at velja ímillum, men einans tveir politiskar valmøguleikar.

Sambandsflokkurin stendur fyri framtíðarpolitikkinum. Tí er Sambandsflokkurin í dag alternativið í føroyskum politikki.

Sambandsflokkurin hevur tær stóru hugsjónirnar, nógv størri enn tær, í rúmast í loysing og fulveldi.

Sambandsfólk hava ongan hug at til at byrgja seg inni - ella úti í atlantshavi. Vit vilja hava allan altjóðapallin at virka á, og hetta gerst nógv best í ríkisfelagskapinum.

Liberalur sambandspolitikkur er eisini inn í framkomna partinum av heiminum. Sambandsflokkurin byggir sín politikk á veruleikan. Vit í sambandsflokkinum fara heldur ikki at blaka burtur rættindir og fyrimunir sum føroyingar eiga.

Sambandsflokkurin er verunliga trygdin fyri vælferðarsamfelagnum

Tí er Sambandsflokkurin alternativið í føroyskum politikki.

Tí kan veljarin trygt seta krossin við Sambandsflokkin.

Gott val.

# Góðu landsmenn

**Jógvan Arge**
*valevni tjóðveldisfloksins*
*til fólkatingið*



Tað kunna vera nógva grundir til at stilla upp til val. Eisini persónligar. Fyri einum ári síðani settu 435 kvinnur og menn meg inn í Tórshavnar Býráð. Tann dygga stuðulin, sum eg fekk á býráðsvalinum, eri eg sera takksamur fyri, tí í býráðnum eri eg komin til eitt áhugavert politiskt arbeiði, har nógv er at gera borgarunum at frama.

Nú standi eg á Lista E til fólkatingsvalið. Eg havi latið meg stilla upp til hesi bæði val av somu grund. Tað er neyðugt at gera skil á viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark, og vit føroyingar eru nú komnir so langt í stríðnum fyri sjálvstýri, at øll segl mugu setast til tess at fullføra setningin.

Mær tykir, at ein sera týðandi treyt fyri at koma á mál, er ein sterkur tjóðveldisflokkur. Tí vildi eg dugna flokkinum á býráðsvalinum seinast, og tí royni eg nú at gera mítt til at fáa ein sterkan tjóðveldisflokk á danating at tala sak føroyinga. Hepnast tað, so haldi eg meg hava verið við til at gera eina góða gerð.

Men eg geri onki einsamallur. Tí biði eg tykkum stuðla Lista E í dag. Eg standi ovast.

# Áheitan

**Marjus Dam**
*Fólkatingsvalevni*
*Sambandsfloksins*



Vilja tygum broytingar í Ríkisfelagsskapinum, so er at velja Sambandsflokkin

Samgonguflokkarnir nýta atkvøðuna til loysing.

Javnaðarflokkurin er enn úti at slingra og roynir at sita á tveimum stólum.

Ein atkvøða fyri Sambandsflokkinum er ein borgan fyri tryggleika og vælferð

# Góðu føroyingar!

**Rani Nolsøe**
*Valevni hjá*
*Tjóðveldisflokkinum*



Boðskapurin frá Tjóðveldisflokkinum á búskaparliga økinum er púra greiður: við landsins fíggjarstýring um hendi, hava vit umsett positivu búskapargongdina frá tí vanliga undirskotinum til yvirskot í landskassanum.

Við fullveldismálum um hendi eru vit í gongd við at greiða politisku fløkjuna millum Føroyar og Danmark og harvið taka av politisku spekulatiónina í donskum pengum her á landi.

Tí fer tjóðveldisflokkurin niður á fólkating við tí greiða boðskapi til frændur okkara í Danmark og Grønlandi, at vælferðin í Føroyum skal byggja á einar sjálvberandi og samhaldsfastar Føroyar - og ikki á skattakrónurnar hjá donskum løntakarum.

Tað hevur ongantíð haft so stóran týdning sum nú, tí ábyrgdarloysi og sundurlyndi í føroyskum politikki eru tíverri tiltikin og hóast djúpu kreppuna í 90'unum hoyrast framvegis politiskar røddir, sum vilja aftur til almennu monopoltíðina, til almenna loftingarpolitikkin, øktan blokkstuðul og minni sjálvbjargni.

Vit føroyingar loyva soleiðis politiska sundurlyndinum og donsku veitingunum at vera sterkasta trumf ímóti okkara veruligu áhugamálum í ríkisfelagsskapinum.

Tí við donskum pengum rullandi í føroyska búskapinum er alla tíðina pláss fyri ábyrgdarloysinum, og vit hava sera ringt við at semjast um at kjølfesta ein politikk, sum byggir á føroyska fólkið og búskapin.

Neistin til fullveldi er kveiktur og fyrstu stigini til veruliga vælferð og veruligt fólkaræði eru tikin. Stig, sum byggja á teg og meg, á okkara land og fólk og viljan at búgva í hesum oyggjum.

Nú vilja vit leggja framtíðina á egnar herðar og egnan búskap og altjóða samstarv.

Ein atkvøða til Tjóðveldisflokkin er trygdin fyri, at vit á Fólkatingi fáa eina greiða og frælsa rødd, sum fremur virðing fyri javnbjóðis samstarvi millum tjóðirnar báðar, ta føroysku og ta donsku.